**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til HMS í Abu Dhabi 2021

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til HeimsMeistarastevnuna á stuttgeil 2021, sum verður í Abu Dhabi í Sameindu Arabisku Emiratunum frá 16. til 21. desember 2021.

Sjálvar kravtíðirnar til einstaklingakappingar eru sum ásettar av altjóða svimjisambandinum FINA, sí https://www.fina.org/competitions/2/15th-fina-world-swimming-championships-25m-2021.

Tað vil siga við A og B kravtíðum, har B-kravtíðin kann nýtast um einans ein luttakari er í viðkomandi kappingargrein, og A-kravtíðin ífall at tveir luttakarar av sama kyni vilja luttaka í somu grein. Gevið gætur at hesar skulu klárast á serliga FINA góðkendum stevnum, sí lista umvegis leinkið omanfyri.

Reglur FINA loyva hartil at vit kunnu taka út eyka svimjarar, upp til og við at hópurin er tilsamans tvær (2) kvinnur og tveir (2) menn. Hesir eyka svimjarar kunnu tá í mesta lagi luttaka í tveimum (2) greinum, og væl at merkja ikki í somu grein sum nakar annar av okkara.

Um trupulleiki er við ov nógvum svimjarum til somu grein, so verður skjótasti svimjari úttikin.

Starvsnevndin kann velja at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. september 2021.

Úttøka av juniorum kann upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravtíð. Gevið tó gætur, at FINA hevur ásett minstaaldur á 14 ár fyri kvinnur og 15 ár fyri menn, og at FINA eisini krevur at viðkomandi svimjarar hava luttikið á føroysku meistarastevnuni.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. sep. 2020 til og við 24. okt. 2021 (til og við Ægir Open Okt 2021)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:

http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Landsliðið til HM á stuttgeil 2021 verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er lokið.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum, og fyri miskiljingum í mun til treytirnar frá FINA.

Vegna starvsnevnd SSF

Rókur í Jákupsstovu

ATLANTIC AIRWAYS

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Kravtíðir til HMS í Abu Dhabi 2021

At klára á stuttgeilastevnum góðkendar av FINA sum úttøkustevnur til HMS 2021

| Kravtíðir - Menn | | | Kravtíðir - Kvinnur | |
|---|---|---|---|---|
| **A - 2 svimjarar** | **B - 1 svimjari** | | **A - 2 svimjarar** | **B - 1 svimjari** |
| 0:21.40 | 0:22.15 | **50 frí** | 0:24.60 | 0:25.46 |
| 0:47.23 | 0:48.88 | **100 frí** | 0:53.78 | 0:55.66 |
| 1:44.88 | 1:48.55 | **200 frí** | 1:55.60 | 1:59.65 |
| 3:44.09 | 3:51.93 | **400 frí** | 4:06.95 | 4:15.59 |
| - | - | **800 frí** | 8:35.69 | 8:53.74 |
| 14:49.29 | 15:20.42 | **1500 frí** | - | - |
| 0:23.79 | 0:24.62 | **50 rygg** | 0:26.81 | 0:27.75 |
| 0:51.30 | 0:53.10 | **100 rygg** | 0:58.08 | 1:00.11 |
| 1:52.66 | 1:56.60 | **200 rygg** | 2:07.19 | 2:11.64 |
| 0:26.57 | 0:27.50 | **50 bringa** | 0:30.69 | 0:31.76 |
| 0:57.63 | 0:59.65 | **100 bringa** | 1:06.18 | 1:08.50 |
| 2:06.23 | 2:10.65 | **200 bringa** | 2:24.30 | 2:29.45 |
| 0:23.08 | 0:23.89 | **50 fírvald** | 0:26.14 | 0:27.05 |
| 0:51.35 | 0:53.15 | **100 fírvald** | 0:58.22 | 1:00.26 |
| 1:54.10 | 1:58.09 | **200 fírvald** | 2:09.76 | 2:14.30 |
| 0:53.57 | 0:55.44 | **100 blandað** | 1:01.21 | 1:03.35 |
| 1:55.25 | 1:59.28 | **200 blandað** | 2:11.51 | 2:16.11 |
| 4:09.19 | 4:17.91 | **400 blandað** | 4:37.54 | 4:47.25 |

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum, og fyri miskiljingum í mun til treytirnar frá FINA

ATLANTIC AIRWAYS